nøvn nú nøvn nú nøvn nú


Heilsanir




Góða, fitta Anja
Hjartaliga tillukku við 18 ára føðingardegnum, sum var 15. des. Tíverri er eingin yrking sett upp (skrivað) til tín hesaferð, men sjálvandi ert tú komin á myndina. Hesaferð eru vit F.1. »Eystur undir land« (sum onkur sigur at tað eitur). Hav tað gott. Vit síggjast.
Heilsan, sofugenturnar



Góði Hans Kristjan
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum 16. des. og alt gott framyvir ynskja
babba, omma og abbi



Góði abbi
Hjartaliga tillukku við tí heilt stóra degnum. Nú mást tú koma skjótt aftur til Havnar. Eg havi ein pakka til tín.
Bestu heilsanir frá okkum øllum, Brynja



Góði, elskaði Erik
Hjartaliga tillukku við 13 ára degnum. Jesus pápi signi teg ynskja
mamma, Leif, Annika, Gert og Andrias

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** 20,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 20,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
Myndaheilsanir, sum eru okkum í hendi við postinum kl. 8 á morgni, leggja vit okkum eftir at fáa í blaðið dagin eftir. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:

.....

.....

.....

.....

.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**

Almannastovan

Allar deildirnar hjá Almannastovuni eru stongdar í døgunum **28. 29. og 30. desember 1998.**

Tó verður skipað fyri bráfeingistænastu hesar dagar.

Viðskiftafólk við bráfeingis ørindum kunnu ringja til økisdeildirnar og Almannastovuna í Havn hesar dagar **kl. 9-13.**

Tórshavn	**tlf. 31 54 80**
Eysturoyar deild	**tlf. 44 82 60**
Norðoya deild	**tlf. 45 72 40**
Suðuroyar deild	**tlf. 37 16 20**

Almannastovan

Eyðkvæmislinjan

svarar alt samdøgrið á tlf. 18820.
Mikudagar kl. 19.00–21.00 fæst persónlig ráðgeving og serligir spurningar verða svaraðir.

VALUTAKURSIR

		15.12.98	Ultimo síðsta mán.
USA	**Dollarar**	630,5900	649,4800
Bretland	**Pund**	1062,8500	1072,7200
Týskland	**Markur**	380,8300	380,5500
Svøríki	**Króna**	78,2900	79,7000
Noreg	**Króna**	80,8800	86,4000
Frakland	**Frankur**	113,6300	113,5600
Belgia	**Frankur**	18,4760	18,4610
Sveits	**Frankur**	471,5600	461,7100
Holland	**Gyllin**	337,8900	337,5300
Italia	**Liri**	0,3852	0,3850
Finnland	**Markur**	125,4600	125,3400
Ísland	**Króna**	9,2500	9,3900
Eysturríki	**Skillingur**	54,1730	54,1270
Spania	**Pesetas**	4,4840	4,4820
Portugal	**Escudos**	3,7210	3,7170
Kanada	**Dollari**	409,3300	423,1300
Grikkaland	**Drakmur**	2,2930	2,2960
Japan	**Yen**	5,4077	5,2692
Írland	**Pund**	946,4300	946,3800
	XEU	747,9400	747,0900

FØROYA SPARIKASSI

Tiltøk

KFUM & KFUK
Várgleði er farið í jólafrí, og byrjar aftur 5. jan.
Opið hús er farið í jólafrí, og byrjar aftur 8. jan.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Sunnudag kl. 11: Morgunmøti.
Sunnudag kl. 12.15: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøld kl. 18: Evangeliskt møti.

Ebenezer, Tórshavn
Sunnudag kl. 12: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøld kl. 18: Evangeliskt møti.
Sunnukvøld kl. 21: Útimøti.
Mánakvøld kl. 20: Bønamøti.
Mikukvøld kl. 20: Uppbyggingarmøti.
Hóskvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti.

Rhema á Hálsi
Í kvøld kl. 20: Húsmøti hjá Ann Mari og Fríðtór Debes, Bringstún 4, Argir.
Sunnudagin kl. 17: Møti og sunnudagsskúli.
Øll eru vælkomin.
Heimasíðan:
rhema@olivant.fo
Tlf./fax 31 77 56

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20.30: Møti.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Í dag kl. 15: Bøn.

Samkoman Sion, Vágur
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 73777.

Betel, Vágur
Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11. Sunnudagsskúli kl. 13.30. Evangeliskur fundur kl. 18.
Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.
Ónsdagin: Uppbyggingarfundur kl. 20.
Tórsdagin: Ungdómsfundur kl. 20.

Frelsunarherurin, Vágur
Hósdagin kl. 17: Hugnaløta fyri børn.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til kl. 15.00. Tlf. 1.7597, skrivitlf. 1.6929
fax 1.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Javni
Skrivstovan í N. Finsensgøtu 32, tlf. 314827, fax 310557, er opin soleiðis: mánadag er stongt, týsdag kl. 10-12, mikudag kl. 10-12, hósdag kl. 14-18 og fríggjadag kl. 10-12.
Tilhaldið hjá Javna er opið 1. fríggjadag í hvørjum mánaða, kl. 14.30-17.
Frítíðarklubbin hevur ymiskar aktivitetir í kjallaranum hjá Javna. Nærri fæst at vita um hetta við at venda sær til skrivstovuna.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Tlf. 316491
Opið er hvønn mánadag-fríggjadag frá kl. 10.00–17.00.
Drekkamunnur og bløðini er at fáa hvønn dag.
Frá 14.–18. des. hava vit opið hús frá kl. 10.00–17.00 í Tilhaldinum. Vit hugna okkum til jóla. Hósdagin gera vit jólafimleik og hava vit eina serliga hugnaløtu aftaná.
Tilhaldið her í Tórsgøtu 21 verður afturlatið frá 18. des. og vit lata uppaftur mánadagin 4. januar 99.
1999 verður eitt serstakt ár fyri Tilhaldið og øll eru vælkomin at koma við hugskotum hvussu vit sermerkja árið.
Vit takka fyri ta stóru undirtøku, sum Tilhaldið hevur fingið og ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og eitt gott nýár.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgurið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Felagið Føroyar-Kuba
Felagið Føroyar-Kuba,
P. O. Box 2055,
165 Argir.
Tlf. og fax 313016.
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com

AA-fundur í Havn
Fundur verður í kvøld kl. 20 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í gomlu lærarahúsunum. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla lærararíðin).

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Samkoma hvønn hósdag frá kl. 20.00.
Bahá'í-samfelagið í Tórshavn